RÁS ...títt radio

# SIG TAÐ SUM TAÐ ER!

## ENDABRESTUR Í VALSTRÍÐNUM Á RÁS2

Mánakvøldið leggur Rás2 upp til hart og livandi kjak úr teimum báðum størstu kommununum í landinum – Tórshavn og Klaksvík. Politisku samanbrestirnir kvøldið fyri sjálvt kommunuvalið verða sendir beinleiðis á Rás2.





## KREPPUKJAK Í KLAKSVÍK

Kristian Fríðrik Olsen, Hans Arni Bertholdsen, Eyðgunn Samuelsen, Kristian Eli Zachariasen, Steinbjørn Jacobsen

Stór skuld, trupulleikar við gjaldførinum, ógvusligar sparingar, uppsagnir og misnøgd. Hvussu er veruliga støðan í Klaksvíkar kommunu, og hvat er fyri framman. Fimm høvuðsvalevni í Klaksvík eru kallað saman til kjak, har valevnini eisini skulu svara naskum spurningum.

RÁS ...títt radio

**MÁNAKVØLDIÐ 19-21**

## HEÐIN OG JAN BRESTA SAMAN

Seinastu tvey valskeiðini hava teir verið borgarstjórar í Havn. Teir eru argir politiskir mótstøðumenn, og nú bresta teir saman eina seinastu ferð áðrenn kommunuvalið týsdagin. Hoyr hvussu tað spælir av, tá Heðin Mortensen og Jan Christiansen leggja í krovið á hvørjum øðrum í kjaki í Miðlahúsinum. Miðlahúsið er opið í sambandi við kjaki, og fólk eru væl komin at lurta í Miðlahúsinum og fáa ein kaffimunn.

RÁS ...títt radio

**MÁNAKVØLDIÐ 21-22.30**